# Ein Mylna afturat



*Í stóra nýggja bygninginum á Hálsi, verður væntamdi møguligt at keypa rundstykkir longu í juli mánaði. Bakaríið Mylnan fer nevniliga at lata enn ein handil upp*
*Mynd Finnur Justinussen*

**Í juli mánaða fáa havnarborgarar enn eitt stað at keypa rundstykkir. Niels Mortensen, stjóri í SMS og í bakarínum Mylnuni, váttar fyri Sosialinum, at ein Mylna afturat í næstum letur upp**

NÝTT BAKARÍ
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Í stóra bygninginum, sum Tummas Hanus Dam byggir uppi á Hálsi, hava eigararnir av Mylnuni leigað seg inn. Ætlanin er at lata enn eitt bakarí, sum eisini fer at selja kolonial, upp.

– Ja, tað er rætt. Vit ætla at lata ein handil upp afturat í nýggja, stóra bygninginum. Talan verður um enn ein Mylnu-handil, slær Niels Mortensen, stjóri, fast.

Hann sigur, at talan verður um ein størri handil, enn tann sum nú er í Berjabrekku.

Hóast handilin verður størri enn núverandi Mylnan, so verður hann tó so mikið lítil, at hann gongur undir teir 250 fermetrarnar, sum nýggja afturlatingarlógin setur sum mark fyri, hvørt handlar skulu hava stongt sunnudag ella ikki.

Sostatt verður møguligt hjá Havnarborgarum at keypa sær rundstykkir og breyð á Hálsi allan sunnudagin eisini.

Niels Mortensen sigur tó, at bakaríið sjálvt verður verandi í Berjabrekku, og nýggi handilin fer sostatt bert at selja vørur frá Mylnuni, ikki at framleiða.

– Um alt gongst sum ætlað, so lata vit nýggju Mylnuna upp í juli, slær Niels Mortensen at enda fast.

## Heimsins størsti toskur

Norðmenn kunnu nú breggja sær av at hava fingið heimsins størsta tosk.

Báturin Birgerson, sum royndi á Bátsfjørðinum, fekk herfyri ein tosk, sum vigaði 46 kilo, eftir hann var kruvdur. Mett verður, at hann hevur vigað eini 56 kg við gørnum.

Toskurin varð seldur fyri vanligan kiloprís, og hann endaði í Belgia. Men nú, tá granskarar hava hoyrt um stóra toskin, vilja teir hava fatur í hann aftur. Teir vilja nevniliga royna at staðfesta hvussu gamal hann er. Roknað verður við, at hann kann vera ímillum 40 og 50 ára gamal.

Norsk bløð hava eisini roynt at kanna metið fyri størsta tosk, men teir hava enn ikki funnið nakran, sum hevur vigað 46 kilo eftir at verða kruvdur.

**eys**

# Mánadagin byrjar forsølan til G!

**Føroya Banki hevur nú bundið seg sum stuðul av G! festivalinum, og hetta ber í sær, at møguleiki verður at keypa atgongumerki til festivalin um heimasíðuna hjá Konto-in**

G!
*eydna@sosialurin.fo*

Í fjør varð fyrstu ferð roynt at selja atgongumerki um alnótina, og tann møguleikin varð sera væl móttikin. Tað er kanska serliga hent hjá fólki á bygd, útoyggj og útisetar. Tí er avger nú tikin um at skipa fyri sølu á alnótini aftur í ár.

Tað verður gjørt umvegis heimasíðuna kontoin.fo, sum Føroya Banki umsitur. Mannagongdin er hon, at atgongumerki verða bíløgd á heimasíðuni, kontonummar verður upplýst og síðani verða atgongumerkini send heim við postinum.

Fyrireikararnir hava lovað, at skráin fyri G! festivalin í ár ikki fer at standa aftan fyri skránna í fjør, so spennandi verður at síggja hvørjum nøvnum teir megna at borðreiða við í ár.

Nøvnini verða kunngjørd 2. mei, tá atgongumerkjasølan eisini byrjar. Í sambandi við at byrjað verður at selja atgongumerki, verður eisini møguleiki at vinna 20 vikuskiftisatgongumerki til G!. Tann møguleikin verður eisini um heimasíðuna hjá kontoin.

# Føroysk teldutala klár

**Í fimm ár hevur verið arbeitt við at gera eina føroyska teldutalu, og nú er hon loksins komin undir land. At smáu Føroyar hava megnað hetta, hevur vakt stóran altjóða ans**

TELDUTALA
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

At føroyingar, við sínum 47.000 fólkum, hava megnað at gera eina teldutalu, ið tosar føroyskt, hevur vakt ans uttanlands.

Í tí sambandi eru umboð fyri alheimsfelagsskapin UNESCO komin til Føroya, nú teldutalan mikudagin verður løgd alment fram.

### Unesco víst áhuga

Karin Kass, ið er leiðari á Føroya Blindastovni, sigur, at umboð fyri Unesco settu seg í samband við tey, fyri uml. 2 árum síðani.

– Unesco hevur stuðlað líknandi verkætlanum runt um í heiminum. Málbólkurin hevur serliga verið smáar tjóðir og máltøkni. Og tá teir frættu um okkara verkætlan her í Føroyum, gjørdust teir alt fyri eitt sera áhugaðir, og settu seg í samband við okkum, greiðir Karin Kass frá.

Hon sigur, at teir veruliga hava verið hugtiknir av Føroyum, og at ein so lítil tjóð hevur megnað at gera eina teldutalu á móðurmálinum.

Og at ein so stórur altjóða felagsskapur hevur víst áhuga, hevur verið ein stórur moralskur uppbakningur fyri tey á Blindastovninum.

– Tað er jú eitt stórt herðaklapp, at Unesco vísir áhuga. Tað hevur líkasum sannført okkum um, at vit hava verið á rættari leið við hesi verkætlanini, sigur Karin Kass.

Hon greiðir frá, at Unesco m.a. eisini ger eitt stórt arbeiði niðri í Etiopia, har tey royna at hjálpa sjónveikum við teldutalu. Men tað fyrigongur alt á enskum, tí málini verða mett at vera ov smá, til at gera eina teldutalu við.

### Endiliga klárt

Nú so endiliga klárt at vísa nýggja telduforritið fram. Tað verður gjørt í Norðurlandahúsinum mikudagin 27. apríl frá kl 14-16.

Fleiri partar hava verið við í arbeiðnum. Fyri málsliga og tøkniliga arbeiðnum hava Sjúrður Gullbein og Petur Helgason staðið fyri. Uni Rasmussen, ið er blindur, hevur eisini verið við í arbeiðnum allatíðina, og hann verður eisini ein av teimum, ið fer at leggja fram hósdagin, greiðir Karin Kass frá.

Hon sigur, at hetta forritið væntandi verður ein stór hjálp fyri nógvar føroyingar. Eisini fólk, ið ikki hava trupulleikar við sjónini.

– Sum er, er tað teldutalan, ið er klár. Men við henni hava vit lagt grundarlag undir nógvum møguleikum. Í framtíðini verður eisini møguleiki at útbyggja tænastuna, til at umfata fleiri ymsik hjálparforrit, m.a.til brúk av internetinum, fartelefonum og aðrari hentari tøkni, sigur Karin Kass at enda.